LM-099/2023

Fylgiskjal 76

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 64
FO-110 Tórshavn

Argir, 23. februar 2024

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu.

Í fylgiskjalið niðanfyri eru viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni við atliti at náttúru- og umhvørvisviðurskiftum.

Vinarligar

Sigga Jacobsen

LM-099/2023

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

Fylgiskjal: viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu

- Umhvørvisstovan skal, sum náttúrumyndugleiki, gera vart við, at heitið náttúrugjald er misvísandi, tí gjaldið fíggjar ikki átøk ella virksemi til frama fyri náttúruna. Tí heitir Umhvørivsstovan á Uttanríkis-og vinnumálaráðið um at nýta annað heiti fyri gjaldið

- Sambært náttúruverndarlógini, sum kom í gildi 1. januar í ár, kunnu ymisk verndartiltøk, eitt nú økisvernd og dýra- og plantuvernd, fremjast við kunngerð. Eins og Umhvørvismálaráðið mælir Umhvørvisstovan staðiliga til at áseta í lógaruppskotinum, at kunngerðir, ferðavinnuætlanir, skilhaldsreglur o.a. sambært lógini altíð skulu vera í samsvari við verndartiltøk sambært náttúruverndarlógini, og at tær víkja fyri verndartiltøkum sambært náttúruverndarlógini, kemur ósamsvar fyri

- Hugtakið burðardygd fevnir um tríggjar tættir: umhvørvis-, samfelagslig, og búskaparlig atlit. Umhvørvisstovan skal vísa á, at hugtakið tykist verða óneyvt brúkt í lógartekstinum, ið kann elva til misskiljingar

- Umhvørvisstovan skjýtur upp nýtt stk. í § 4 fyri at avmarka órógv á fuglalív, lendi og plantur:
  "Tað er í ferðavinnuhøpi bannað at brúka motorakfør uttangarðs, eisini í áum og á vøtnum"

Um ferðavinnuætlanir:

- Tað er týdningarmikið, at ferðavinnuætlanirnar hjá kommununum taka støði í vitan um náttúru, serliga náttúru, sum er viðkvom ella hótt og hevur tørv verju. Tað er eisini týdningarmikið, at Uttanríkis- og Vinnumálaráðið í góðkenningartilgongdini tryggjar sær, at ferðavinnuætlanirnar eru í tráð við somu vitan.

- Farið verður miðvíst undir at kortleggja/talgilda upplýsingar um náttúru. Eitt nú hvar fuglur heldur til fram við landi. Í næstum verður farið undir at fáa økini, sum í Ferðavinnuøkisætlanini frá 1994 eru bólkað sum 'friðingarverd' ella 'áhugaverd' plantu- og djórafrøðiliga, inn í okkara GIS-skipan. Við tíðini er ætlanin, at kommunur fáa atgongd til hesar upplýsingar á netinum. Í sama viðfangi verður gjørt vart við, at tað hevur týdning, at ferðavinnuætlanirnar hava ein talgildan kortpart. Umhvørvisstovan veitir fegin ráðgeving í slíkum spurningum.

- At umhugsað verður hvussu viðkvom náttúra ikki verður órógvað, eitt nú, at øki, har nógvur fuglur eigur, verða stongd fyri ferðafólki í bútíðini, og at gøtur verða lagdar uttan um hesi økir, vátlendir og onnur viðkvom økir

- At umhugsað verður at áseta berievni, eisini nevnt *carrying capacity*, fyri økir, leiðir, bygdir ella oyggjar (sí nærri útgreina í áliti um burðadygga ferðavinnu frá 2018 (aliti.pdf (cdn.fo)) - at ein ferðavinnuætlan skal fyrihalda seg til "hvat tolir hetta øki/leiðin/bygdin/oyggin av vitjandi/ferðslu"

umhvørvisstovan
FAROESE ENVIRONMENT AGENCY

- At ætlanirnar verða tíðaravmarkaðar og vera endurskoðaðar við jøvnum millumbilum eitt nú 3. – 5. hvørt ár